TIT SPYRJA VIT SVARA



Bergur Hansen, djóralækni — *Heri Joensen, prestur* — *Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur* — *Ingi Højgaard, løgfrø›ingur* — *Jens Andreassen, lækni* — *Jóhanna á Tjaldraflötti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur* — *Jón Klein Olsen, politistur* — *Jón Kragesteen. Fer›slutrygd* — *Julianna Næs, pedagogur* — *Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi* — *Turid Thomsen, lestrarvegl ei›ari* — *Marius Staksberg, málfrø›ingur*

Spurnarkassin 28. nov. 2000

Sálarfrø›ingurin

Ger føroyska samfelagi› ov líti› fyri at geva fólki, sum koma út fyri ymsum ræ›uligum ella negativum hendingum, sálarliga hjálp?

Nú veit eg ikki um tann, i› spyr, hugsar um naka› ávíst — men skal eg svara generelt, vil eg siga, at í tann mun, at fólk, i› hava tørv á tí, ikki fáa ney›uga sálarfrø›isliga hjálp, ger samfelagi› ov líti›. Hjálp frá sálarfrø›ingi eigur og kann ikki vera ta› fyrsta, vit hugsa um, tá okkurt "negativt ella ræ›uligt" hendir. Familja, vinir, felagar eru fólk, i› vit eiga at kunna heita á og eisini fáa rá› og lei›beining frá. Og oftast er ta› so, at brúk ikki er fyri professionellari hjálp yvirhøvur. Men undantøkini eru, og kanska eru ta› tey, vit hoyra mest um í hesum døgum, nú nógv ver›ur tosa› um kynsligan og annan ágang mótvegis børnum. Sum heild ber til at siga, at eydnast ta› ikki fólki, i› hevur veri› úti fyri sera ógvusligari ella ágangandi hending, at gera seg sálarliga og likamliga leysan av henni aftur, gráta, skelda, syrgja, hugsa seg lidnan, og liva ví›ari, eigur at vera bi›i› um serkøna hjálp. Og har hava vit, sum er, ikki tøl fyri, hvussu stórur tørvurin er. Men frá teimum sálarfrø›ingum, i› arbei›a vi› privatari og almennari vi›ger› veit eg, at tørvurin er nógv størri enn til ber at nøkta hjá teimum. Og á einum øki er vit samfelagsliga sæ› illa fyri, tá ta› sn‡r seg um sálarfrø›iliga hjálp, og ta› er um umfatandi vanlukkur henda, sum t. d. flog- og skipsvanlukkur. Í verandi tilbúgvingarætlan fyri Føroyar eru sálarfrø›ingar sum professjónsbólkur ikki sjálvstø›ugt umbo›a›ur. Ta› er óheppi›, vita vit, i› hava veri› vi›, tá i› ólukkur av tí slagnum, sum nevndar eru omanfyri, koma fyri.

Løgreglan

Hvat ger løgreglan fyri at for›a fyri, at ung undir 16 ár ogna sær prutl? Átti løgreglan ikki at gjørt eitt upp l‡sandi arbei›i mótvegis foreldrunum, solei›is at tey vór›u ávara› um ikki at keypa prutl til børnini, sum ikki hava aldurin at koyra?

Ta› er onki, som for›ar fyri, at ung undir 16 ár ogna sær prutl, um tey annars kunnu gjalda. Skal ein keypssáttmáli gerast og undirskrivast, skal tann ungi hava foreldur ella verja til at undirskriva. Fer›slulógin sigur greitt, at prutl bert kann koyrast av persóni, sum er fyltur 16 ár og hevur fingi› koyrikort til prutl. Henda royndin fer fram á Bileftirlitinum

Naka› beinlei›is uppl‡sandi arbei›i mótvegis foreldrum ver›ur ikki gjørt og hevur helst ikki veri› mett ney›ugt, tí 16 ára aldursmarki› hevur veri› alment kent í nógv ár. Annars kemur ofta fyri, at foreldur venda sær til løgregluna at spyrja um aldur til prutlkoyring. Spurningurin um aldur og koyrikort til prutl ver›ur ofta umrøddur, tá i› skúlanæmingar koma á vitjan hjá løgregluni og somulei›is, tá i› løgreglan kemur út á skúlar og a›rar stovnar.

Var 8. nov 2000 á veg til Havnar og komin til Kollafjør› (Langasand), møtti eg einum stórum lastvogni, sum var ovurfyltur vi› gróti. Hesin missur ein stóran stein úr lastini, sum smellur í vegin og br‡tur nr. rammu og ger eina buglu á bilin. Hann hev›i ikki møguleika at ste›ga, tí fleiri bilar koyrdu tætt aftanfyri.

1) Kann løgreglan ikki gera naka› vi›, at bilarnir koyra ovurfyltir?

2) Kann løgreglan ikki gera eitthvørt vi›, at á vegnum og framvi› liggja stórir steinar?

3) Hvør skal rinda fyri ska›an?

Tá er sambært fer›slulógini ábyrgdin hjá bilføraranum at ansa eftir, at bilurin er forsvarliga lessa›ur, solei›is at onki dettur av bilinum til ampa ella ska›a fyri onnur. Løgreglan ger dagliga fer›slukanningar - eisini vi›víkjandi bilum, sum koyra ovfyltir.

Løgreglan kann sum so ikki gera nógv vi›, at á vegnum og framvi› vegnum liggja stórir steinar o.a. Tá løgreglan fær frábo›an um tílíkt ella løgreglan sjálv sær tílíkt, bo›a vit beinanvegin Landsverkfrø›inginum frá hesum, um talan er um landsveg og annars kommununum, um talan er um kommunalan veg. Vit hava gott samstarv vi› bæ›i Landsverkfrø›ingin og kommurnar, og okkara royndir eru, at tá vit bo›a teimum frá slíkum, ver›ur fari› beinanvegin at rudda. Annars gera efitlitsfólkini hjá Landsverkfrø›inginum og kommunum eitt stórt arbei›i vi› at halda vegin reinan, uttan at hava fingi› bo- frá løgregluni um hetta.

Til spurningin, um hvør skal rinda fyri ska›an er at siga, at ta› er sera umrá›andi at fáa sta›fest, hvør bilurin var sum gjørdi ska›an, og helst eisini hvør bilførarin var. Hetta er best at fáa sta›fest beinanvegin. Hvør i› skal rinda fyri ska›an er eftir míni metan ein tryggingarspurningur, um eigarin ella førarin á bilinum, sum gjørdi ska›an ikki sjálvur vil gjalda fyri ska›an.

Sosialrá›gevin

Nú ein dagin banka›i uppá dyrnar. Har stó› ein lítil fítt genta og spurdi, um eg vildi keypa ein jólakalendara til frama fyri fátøk børn í Føroyum. Eru ta› nógv børn í Føroyum, sum ikki hava ta› so gott?

Sum sosialrá›gevi hjá barnaverndarnevndini í Tórshavnar kommunu, veit eg, at ta› eru nógv børn í Føroyum, sum ikki hava ta› gott. Vit hava í Tórshavn yvir 500 mál, tvs. børn, harav uml. 30 % eru børn, sum á ein ella annan hátt liva undir vansorgan "omsorgsvigt", og í flest førum hava foreldur teirra tørv á hjálp.

Eg vil ikki siga, at ta› eru nógv børn í Føroyum, i› eru fátøk uppá pengar. Hinvegin vantar teimum umsorgan og kærleika, sum er eitt ta› t‡dningarmiklasta fyri trivna›in hjá barninum. Vit royna eftir førimuni at hjálpa hesum børnum og foreldrum teirra. Vit hava lagt til merkis, at fólk sum heild eru vor›in meira vitandi um t‡dningin av trivna›inum hjá barninum og eru skjótari at koma vit áheitan til okkara um at hjálpa, um so er, at tey leggja til merkis, at barni› misstrívist.

So ni›urstø›an av spurninginum má ver›a, at tíverri eru ta› alt ov nógv børn í Føroyum, sum liva undir umstø›un, i› ikki eru nøktandi fyri trivna›in hjá barninum, men í nógvum førum ver›ur tíbetur roynt at bøta um umstø›urnar.

Djóralæknin

Tá i› ein hundur fleiri fer›ir um vikuna koppar ruskílati› í túninum og endavendur øllum sum er í, er ta› tí at hundurin ikki fær nóg miki› at eta?

Orsøkin til, at hundurin leggur á ruskspannina n‡tist ikki at vera, at hundurin er svangur. Líka so gjarna kann ta› vera okkurt í ruskílatinum, sum spennandi roykur stendur av. Vi› hvørt síggja vit, at hundar válka sær í einum og hvørjum, sum luktar sera illa fyri at fá luktin upp á seg. Hví teir gera hetta, vita vit ikki.

Fer›slutrygd

Hvat ítøkiligt hevur Rá›i› fyri Fer›slutrygd gjørt fyri at for›a fyri, at fer›sluvanlukkur henda í komandi ári?

Spurningurin er sera ítøkiligur og einfaldur, men ta› ber ikki til geva eitt einfalt svar. Fyrst skal ver›a víst til, at í vi›tøkunum fyri Rá›i› fyri Fer›slutrygd stendur m.a., at endamál rá›sins er at gera fer›sluna tryggari vi› at bøta um fer›sluvanarnar vi› uppl‡sing og undirvísing. Hetta ver›ur fyri ein part gjørt gjøgnum fjølmi›larnar, men eisini ver›ur skipa› fyri beinlei›is undirvísing, t.d. av skúlanæmingum. Tey yngstu og foreldur teirra ver›a eisini rokkin í gjøgnum Fer›sluring Barnanna, sum øll børn millum 3 og 7 ár eru "limir" í. Fer›slutrygd sær ta› eisini sum sína uppgávu at vera vi› til at betra um fer›sluumhvørvi› og í hesum sambandi ver›ur roynt at kunna og ávirka avvar›andi myndugleikar um fer›slutrygdarvi›urskifti. Sum heild kann sigast at alt, sum hevur vi› fer›slu og fer›slutrygd at gera, er áhugaøki hjá Fer›slutrygd.

Sjálvsagt eru gjørdar ra›festingar, sum gera av, hvar orkan ver›ur løgd. Og her eru ungdómurin og børnini í fremstu rø›. Sum ítøkiligt dømi skal undirvísingin av 9. floksnæmingum ver›a nevnd. Talan er um eitt dagsskei›, har endamáli› er at seta ungdómin andlit til andlits vi› fólk, i› hava uppliva› veruliga fer›sluvanlukku, og sum tí tosa út frá upplivingum úr egnum barmi. Eisini ver›ur vi› filmum og myndum roynt at l‡sa, hvussu ógvusliga náttúrukreftirnar leika í, tá i› illa vil til. Tiltaki› ver›ur gjørt í samstarvi vi› Politii›, Ambulansutænastuna á Landssjúkrahúsinum og fer›sluoffur. Tiltaki› ver›ur endurtiki› hvørt ár og hvør einasti 9. flokkur í landinum hevur veri› vi›.

Lagt skal ver›a afturat, at Fer›slutrygd sum framtí›armál hevur sett sær fyri at fáa landsins myndugleikar at taka undir vi› "Nullhugsjónini". Ov drúgt ver›ur at grei›a frá um "Null-hugsjónina" í hesum umfari, men nevnt skal ver›a, at endamáli› í henni er, at eingin skal ver›a álvarsliga skaddur í fer›sluni.

Pedagoturin

F‡ra ára gamli sonur okkara er ein fittur og gó›ur drongur, men hann hevur tupult vi› at finna sær fastar vinir millum javnaldrarnar og hini børnini í dagrøktini. Hann er ikki uppsøkjandi í so máta og spælir vi› ein nú og annan tá. Hvussu stóran t‡dning hevur ta›, at hann ikki hevur fastar vinir, og hvat kunnu vit gera fyri at hjálpa honum í so máta, solei›is at hann finnur sær fastar spælivinir?

Út frá tykkara spurningi, hví sonur ikki finnur sær fastan spælivin í dagrøktini, kann eg svara solei›is. Dagrøktarskipanin tekur útgangsstø›i í heiminum, og tí sum dagrøktarin hevur at bjó›a. Ta› vil altí› vera ymiskt, hvussu børnini eru samansett í aldri, hetta kann hava sína ávirkan á, hví sonurin ikki finnur ein fastan vin í dagrøktini.

Eg meini avtgjørt, at sum foreldur kanst tú hjálpa barnnum rættiliga væl vi› at fáa onkran gó›an spælivin. At sonur tykkara spælir vi› ein nú og annan tá, t‡›ir uppá, at hann avgjørt er uppsøkjandi, hann roynir sikkurt alt hann kann at finna sær spælivinir.

Ta› hevur t‡dning fyri sosialu menningina, at barni› hevur onkran fastan spælivin, tí at ta› er m. a. her barni› mennir evnini at kn‡ta tættari vinarlag.

Til spurningin, hvat tit kunnu gera fyri hjálpa dronginum at finna sær fastar vinir. Ta› er ta›, tit sum foreldur leggja dent á í spæliumhvørvinum hjá dronginum, sum hevur stóran t‡dning. Ta› foreldrini halda, hevur nógv at siga, tá i› man er f‡ra ár.

Sum 4 ára gamal er ein ikki altí› sjálvur førur fyri at finna sær spælivinir. Her er ta›, at tit sum foreldur kunnu hjálpa soninum, at hann hevur gó›ar umstø›ur at spæla, t. d. at ta› er pláss í umhvørvinum, her hugsi eg ikki fermetrum, men at tey t. d sleppa at vera inni og spæla, ta› er best um børnini sleppa at spæla nær vi› har, sum tey vaksnu eru, at børnini fáa fri› at spæla sítt spæl undir teimum umstø›um, sum ein nú hevur í heiminum.

Eisini er ta› umrá›andi, at børnini møtast nátúrliga t. d. spæla vi› børnini í grannalagnum.

Ta› er vi› børnum sum vi› okkum vaksnum, ta› eru ikki øll, man kann hava til vin, men ta› er avgjørt gott fyri trivna›in at gera sær ómak at byggja upp eitt gott vanarlag og harvi› fáa ein gó›an spælivin.

ítróttur

Nr. 229 • t‡sdagur • 28. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Todi best í Danmark

Sí›a 14

Kvinnurnar í eldin

Nú stundar av álvara til hjá kvinnulandsli›num í hondbólti, og um vikuskifti › vór›u seinastu fyrireikingarnar til komandi landsdystirnar gjørdar

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk



Venjarin hjá kvinnulandsli›num er ikki sørt spentur, tó at talan ver›ur um tvær sera truplar uppgávur um vikuskifti ›

Í landskappingini var eingin hondbóltur í bestu deildini hetta vikuskifti›. Orsøkin var sjálvsagt landsli›svenjingarnar, sum ætlandi skuldu haldast í Su›uroy. Hetta gjørdist tó bert veruleiki hjá kvinnulandsli›num, tí venjingarlegan hjá monnunum var› avl‡st. Orsøkin til hetta var fyrst og fremst, at fleiri leikarar í løtuni dragast vi› ska›ar.

Útlendsk mótstø›a

Kvinnurnar høvdu hinvegin sína venjingarlegu sum ætla›, og nú stundar eisini til hjá teimum, tí stór og spennandi uppgáva bí›ar teimum um knappar tvær vikur.

Fríggjadagin, 1. desember, ver›ur ítróttahøllin í Klaksvík karmur um fyrra dystin móti svenska kvinnulandsli›num, og einki er at ivast í, at talan her ver›ur um eina trupla uppgávu. Seinni dysturin ver›ur í Havn, sunnudagin, 3. desember

Svenska li›i› ver›ur mett at hoyra heima millum tey 15 sterkastu í Europa, so neyvan kunnu okkara genturgera sær nakrar vónir um at vinna dystirnar. Hinvegin ver›ur ta› sera spennandi at síggja, hvar vit flóta í hesum samanhangi.

Umframt at tær um vikuskifti› hava vant saman, so var› eisini ein dystur fyriskipa›ur, har føroysku kvinnurnar royndu seg móti einum li›i, sum var sett saman av útlendsku leikarunum, sum eru í Føroyum. Einki er at ivast í, at hetta er eitt sera gott hugskot. Ta› hevur jú fleiri fer›ir veri› tosa› um, at nøktandi mótstø›a ikki fæst í Føroyum, tá bestu leikararnir eru saman á einum li›i, men sunnudagin fekk føroyska landsli›i› í øllum førum mótstø›u, tí útlendingarnir vunnu 27-25.

Betra um sterku sí›urnar

Dysturin enda›i nevnliga vi› teprum sigri til útlendingarnar, men hóast tapi›, so var venjarin hjá føroyingunum, Sophus-Dal Christiansen, væl nøgdur. Bæ›i vi› dystin og vi› venjingarnar.

– Spæli› hjá okkum var kanska eitt sindur nervøst til tí›ir, men sjálur haldi eg tó, at vit hava fingi› nógv burtur úr. Man sær kanska eisini, at vit væl kundu havt tørv á fleiri venjingardystum, men ta› vita vit, at vit ikki fáa, og so mugu vit bara arbei›a eftir tí.

– Annars hava vit undir venjingunum arbeitt eftir sama leisti, sum vit hava gjrøt higartil í ár. Hetta hevur veri› at betra um sterku sí›ur okkara, heldur enn at blaka okkum út í fleiri n‡ggj ting, sum vit allíkavæl ikki fáa vant nóg nógv.

Gera sítt besta

Um komandi dystirnar er venjarin annars sera spentur.

– Ta› er sjálvsagt naka›, sum vit øll gle›a okkum til, og fyrst og fremst er mál okkara at geva okkum ta›, sum vit kunnu.

– Hondbóltsliga eru vit ikki betri enn tær, so langt burtur frá, men ta› ver›ur helst heldur ikki kravt av okkum, at vit skulu vinna dystirnar.

– Uttan vónir eru ásko›ararnir tó neyvan, og kanska hev›i ta› veri› lættari hjá okkum, um dystirnir vór›u spældir uttanlands, har einki tr‡st hev›i veri› á, men invegin er ta› altí› stuttligt at spæla á heimavølli, sigur ein spentur landsli›svenjari at enda.

Johan og Óli spæla ikki meiri í ár

Burtursæ› frá Toda Jónsson var eingin føroyingur í dysti í superliguni sunnudagin. Í gjárkvøldi› høvdu Jákup Mikkelsen og teir møguleika at lyfta seg upp um ni›urflytingarstrikuna

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Johan B. Hansen var í hópinum hjá OB, tá teir í Odense høvdu vitjan av AaB. Men føroyski landsli›sma›urin kom ikki á vøllin. Óli Johannesen var ikki í hópinum hjá AGF, sum frammanfyri seks túsund ásko›arum spældi ímóti grannunum úr Silkeborg. Nú er sí›sti møguleikin hjá Óla Johannesen at spæla vi› AGF farin. Superligan fór sunnudagin í vetrarfrí, og tá fótbólturin aftur fer á rull í Danmark, fer Óli Johannesen at spæla vi› Hvidovre í næstbestu deildini.

Ein dystur var› ikki spældur fyrrenn í gjárkvøldi›. Tá høvdu Jákup Mikkelsen og hinir í Herfølge vitjan av oddali›num í superliguni, Brøndby. Um Herfølge vann ímóti Brøndby, so fóru teir upp um ni›urflytingarstrikuna, og so datt AB ni›ur um strikuna.

AB, sum í summar var› mett at hava besta mi›vøllin í superliguni, tapti sunnudagin 2–1 í Lyngby. Dysturin stó› í skugganum av FCK og Parkini. Bara 2.327 ásko›arar møttu í Lyngby. Úrsliti› hevur vi› sær, at Lyngby heldur jólafrí á fjór›a plássinum.

OB lá undir

OB tapti 3–2 á heimavølli ímóti AaB. Merkisvert fyri OB var ta›, at Per Pedersen, sum er giftur vi› fyrrverandi danska landsli›sspælaranum í hondbólti, Anju Byrial Hansen (hon er systir Johan B. Hansen) skora›i. Per Pedersen hevur veri› illa plága›ur av ska›um. Hann var› skiftur inn í 2. hálvleiki, og f‡ra minuttir undan leikloki sendi hann hornaspark beinlei›is í máli›.

Lagi› var gott í Odense. Teir høvdu veri› aftanfyri 2–0, og nú sá út til, at teir skuldu fáa eitt stig burturúr. Men solei›is sá ta› bara út í eina lítla løtu. Í tí›ini, sum dómarin hev›i lagt afturat, skora›i Søren Frederiksen sigursmáli› fyri AaB. Søren Frederiksen hev›i frammanundan lagt AaB framum 2–0. Dysturin var merkisverdur fyri AaB og Søren Frederiksen. Á n‡ggjárinum flytir álopsma›urin, sum higartil í hesum kappingarárinum hevur skora› tíggju mál, til Viborg, har hann er uppvaksin.

Sólarglottarnir

Viborg var í Ikast og spældi ímóti FC Midtjyllandi. Í Danmark eru fjølmi›larnir á einum máli um, at ta› júst eru hesi bæ›i li›ini, sum hava sta›i› fyri tí mest positiva higartil í hesum kappingarárinum.

Undirhaldsvir›i› var sera høgt í Ikast. Viborg var á odda 1–0 og 2–0, á›renn heimali›i› svara›i aftur og leg›i seg framum 3–2. Í 2. hálvleiki svara›i Viborg aftur. Teir javna›i til 3–3, og sí›stu løtuna skora›u teir tvey mál afturat. Ta› ver›ur mett at vera ikki líti› sannlíkt, at ta› kann eydnast hjá Viborg at vinna fyrsta DM heiti› nakrantí›. Viborg heldur jólafrí á tri›ja plássi. FCM hevur veri› á ø›rum plássi, men tapi› hesa fer› hev›i vi› sær, at teir halda frí á sætta plássinum. FCK er á fimta plássi.